


*Á hesum kortinum síggjast bæði uppskotini til tunlar ímillum Øravík og Hov. Sjálvir tunlarnir eru svartir við hvítari striku ígjøgnum. Høgrumegin er uppskotið hjá Landsverkfrøðinginum. Hetta er ein tunnil, sum gongur í ein stóran boga, langt úti ímóti Hovsegg og í 140 metra hædd hovsmegin og í 53 metra hædd Øravíkarmegin. Í sambandi við tann tunnilin skulu 4,2 kilometrar av vegi gerast. Uppskotið hjá NCC er ein beinur tunnil, sum gongur inn á fjallið, har landsvegurin er lægstur, heilt niðri í dalinum í Hovi, niðri við sjógvin. Í sambandi við hendan tunnilin er neyðugt at gera 200 metrar av vegi. Hendan tunnilin, og vegin, kann NCC gera uppá 20 mánaðir fyri 92 milliónir*

# Kunnu gera tunnil 30 milliónir bíligari enn Landsverkfrøðingurin

**Felagið, sum gjørdi undirsjóvartunnilin, kann gera Hovstunnilin einar 30 milliónir bíligari enn Landsverkfrøðingurin kann gera tunnilin fyri- og so fáa vit harafturat ein nógv betri tunnil**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Útfrá teimum upplýsingum, vit hava í løtuni, fer ein tunnil ímillum Øravík og Hov at kosta 92 milliónir.

Norska felagið NCC, sum hevur gjørt undirsjóvartunnilin, er nú eisini komið upp í ætlanina at gera tunnil ímillum Øravík og Hov.

Hetta hevur vakt stóran ans í Suðuroy, tí umframt at tunnilin sostatt verður einar 30 milliónir bíligari enn Landsverkfrøðingurin kann gera tunnilin fyri, hevur NCC valt eina aðra linjuføring, sum ger, at tunnilin verður munandi betri.

Tað eru suðuroyingar, sum av sínum eintingum hava biðið NCC um at meta um verkætlanina.

Og eftir at hava kannað málið, sigur felagið, at tað ber til at gera tunnilin bæði betri og bíligari enn Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp.

### Loysir ikki trupulleikan

NCC sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur valt tað tryggu loysnina og hevur tí lagt tunnilin ígjøgnum eitt basaltlag, sum er væl kent fyri at tryggja seg ímóti trupulleikum.

– Hetta er eisini neyðugt við teirri útgerð og teirri tøknifrøði, sum Landsverkfrøðingurin hevur til taks.

- Loysnin hjá Landsverkfrøðinginum fer eisini at bera í sær, at arbeiðið at tryggja tunnilin verður lítið og onki.

Men NCC leggur afturat, at fyri ferðsluna er linjuføringin, sum Landsverkfrøðingurin hevur lagt, óheppin!

- Tað verða brattar brekkur báðu megin tunnilin og hendan loysnin tykist ikki at loysa trupulleikarnar, sum nú eru av trygdini og ferðsluviðurskiftunum annars á hesum strekki.

-Men verður tunnilin fluttur nærmari Hovi og Øravík, slepst bæði undan brekkunum, samstundis sum trupulleikin við trygdini verður loystur.

Samstundis verður farleiðin einar tveir kilometrar styttri.

NCC sigur, at hetta ber til við teirri nýmótans útgerð, sum er til taks nú á døgnum. Tað ber væl til at bora ígjøgnum aðrar basaltfláir enn hana, sum Landsverkfrøðingurin hevur valt og tað ber eisini til at bora tunlar ígjøgnum ymsar fláir.

Tað fer at krevja størri arbeiðið at tryggja tunnilin, men eisini tað ber til.

### Byggitíð: 20 mánaðir

NCC sigur, at verður teirra linjuføring vald, verður tunnilin 400 metrar longri, ella 2.500 metrar, men afturfyri verða næstan tríggir kilomettar styttri av vegum at gera. Men harafturat verður so nógv tilfari til taks at brúka í nýggju samferðsluhavnini á Trongisvágsfirði, at hon verður einar 15 milliónir bíligari.

NCC sigur sostatt, at útfrá teimum upplýsingum, sum eru til taks í løtuni, kann hesin tunnilin gerast fyri 92 milliónir, umframt mvg og tá eru 200 metrar av vegi taldir uppí.

Samstundis fer tað bert at taka 20 mánaðir at gera arbeiðið, tað eru minni enn tvey ár.

NCC sigur, at endaliga linjuføringin verður løgd, tá ið jarðfrøðin er kannað gjølligari, men tað verður ikki neyðugt við fleiri kjarnuboringum ella seismiskum kanningum.

Samstundis bjóðar NCC sær eisini til at fíggja arbeiðið!

Í kostnaðarmetingunum, sum Landsverkfrøðingurin hevur gjørt yvir sítt projekt, fer tunnilin at kosta kosta einar 125 milliónir. Hesin tunnilin verður 2.100 metrar, men so skulu 1,4 kilometur av vegi gerast afturat hovsmegin og 2,8 kilometrar av vegi øravíkarmegin.

Sí eisini grein á síðu 8.



# Steffen tekur tað róligt

**Steffen Stummann Hansen tekur nógva rokið um sína starvssetan púra róliga, og hann gleðir seg framvegis at koma til Føroya**

STARVSSETAN
*Heri á Rógvi*



*Steffen Stummann Hansen tekur nógva rokið um sína starvssetan púra róliga.*

Nýggi landsantikvarurin, Steffen Stummann Hansen, upplivir ikki tað nógva rokið beinleiðis við fjarstøðuni til Keypmannahavnar, har hann arbeiðir og býr.

Seinastu vikuna hevur hetta málið meira enn nakað fingið ans í føroysku fjølmiðlunum.

Eftir ætlan byrjar Steffen Stummann Hansen í starvinum á Føroya Fornminnissavnið miðskeiðis í mars, og hann kemur til Føroya stutt áðrenn.

Steffen sigur, at hann hevur hoyrt um, at tað verður tosað um starvssetanina í Føroyum, men hann tekur tað róligt.

– Eg havi longu móttikið heilsanir frá fólki ymsastaðni úr Føroyum við ynskum og góðan byr. Eisini fólk uttanfyri Føroyar hava givið seg til kennar. So eg taki alt púra róliga.

Eg gleði meg nógv at byrja nýggja arbeiðið, og eg eri vísur í, at eg havi nakað at bjóða føroyingum, sigur Steffen Stummann Hansen.

### Pr. telefon

Steffen Stummann Hansen fekk at vita um sítt nýggja starv umvegis eina telefonsamrøðu. Enn hevur hann einki formelt bræv fingið sendandi, men hann er vorðin kunnaður um setanin við einari telefonsamrøðu.

Hetta upplýsir Annlis Bjarkhamar fyri Sosialinum.

Símun V. Arge fekk eitt bræv frá landsstýrismanninum, har greitt varð frá, at annar umsøkari varð settur enn hann, tí hesin var betri kvalifiseraður enn virkandi landsantikvarurin.

# Løgmaður bíðar enn

Løgmaður hevur í skrivi dagfest 5. februar biðið Annlis Bjarkhamar, landsstýrismann í mentamálum, um eina frágreiðing um málið viðvíkjandi setanini av nýggjum landsantikvari. Samstundis verður biðið um avrit av øllum viðkomandi skjølum í málinum umframt skrásett skjalayvirlit í teimum málum, ið á nakran hátt hava við nevndu setan at gera.

Anfinn Kallsberg og Løgmansssskrivstovan hava tó hvørki fingið skjøl ella frágreiðing enn.

– Eg hevði roknað við, at fingið skjølini týsdagin, men eg havi einki fingið enn, segði løgmaður hósmorgunin.

Spurdur, sigur løgmaður, at hann einki kann siga, hvørjar møguligar fylgjur hansara kanningar fara at hava fyri sjálvan Steffen Stummann Hansen, ið varð settur í starv.

– Eg havi valt at fara inn í málið, men enn er viðgerðin ikki farin ígongd, og tí er ov tíðliga at siga, hvørji stig kunnu hugsast at verða tikin, sigur Anfinn Kallsberg.

# TV3 hjá Televarpinum

**Televarpinum fer í framtíðini eisini at hava Viasat rásir í sínum útboði. Teirra millum er TV3**

SJÒNVARP
*Heri á Rógvi*



*Føroyska Birita og hini luttakararnir í Robinson koma á skíggjan hjá kundum hjá Televarpinum. Til apríl verður hetta ókeypis.*

P/f Televarpið og Viasat Danmark A/S gjørdu mikukvøldið avtalu um rættindini til fleiri av rásunum hjá Viasat, teirra millum TV3 Danmark, 3+ og ViasatSport.

Frá Televarpinum frætta vit, at tey ætla sær ígongd beinanvegin.

- Fyri at tryggja, at allir haldararnir sleppa at fylgja gongdini í Robinson frá byrjan, hava vit valt at senda TV3 beinanvegin, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri í Televarpinum. Hesar vikurnar fram til 1. apríl verður TV3 ókeypis, og allir haldarar okkara fáa atgongd til rásina ta tíðina, sigur hann. Frá 1.apríl verður so neyðugt at keypa ein av pakkunum við Viasat-rásunum fyri at síggja TV3, stendur at lesa í tíðindaskrivi frá Televarpinum.

Sum fylgja av nýggju rásunum verður skift eitt sindur um í programmpakkunum hjá Televarpinum.

– Avtalan ber í sær, at Televarpið broytir tilboð síni frá 1.apríl. Alt pakkamynstrið verður lagt um, soleiðis at haldararnir kunnu velja millum fleiri grundpakkar, sigur Tróndur Djurhuus í tíðindaskrivi.

Eisini fer at bera til at keypa ein marglætispakka, sum hevur allar rásirnar í núverandi grundpakkanum og rásirnar frá Viasat.

Televarpið hevur samstundis fingið rættin at selja TV3 og hinar rásirnar til eigarafeløg og aðrar serkundar.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið upplýst, hvørji nýggju gjøldini vera fyri pakkarnar hjá Televarpinum.







